TÓRSHAVNAR KOMMUNA

Heilsu- og umsorganartænastan

Dagfesting
4. apríl 2019

Føroya Løgting
ÁARVEGUR 2
POSTBOX 208
110 TÓRSHAVN
Att.: Trivnaðarnevndin

Okkara j.nr.
18/04400-4

Málsviðgeri
Marjun Berg

Tygara j.nr.

**Viðmerkingar til løgtingsmál nr. 100/2018 og 101/2018: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um útleigan av bústøðum og broyting í løgtingslóg um heimatænastu, eldrarøkt v.m.**

Vísandi til fund í Løgtinginum við Trivnaðarnevndina 2. apríl 2019 skal Tórshavnar kommuna í framhaldi av munnligu viðmerkingunum viðmerkja, at Tórshavnar kommuna, eins og Almannaverkið, ynskir lógarfesta heimild at gera avtalur við útleigarar um um leiguíbúðir.

Ítøkiliga ynskir kommunan at fáa heimild til at ávísa leigubústaðir í Tórshavnar kommunu, sum Bústaðir umsitur og heimild at gera avtalur um leigubústaðir, sum privatir útleigarar umsita.

Sambært § 24b, stk. 1 í Leigulógini hevur Almannaverkið ávísingarrætt til 5. hvørja íbúð í almennum bústaðafelagi. Í lógaruppskotinum verður skotið upp, at Almannaverkið harumframt fær lógarfesta heimild at gera avtalur um ávísingarrætt til privatar leiguíbúðir. Hesar avtalur skulu góðkennast av landsstýrismanninum og skal landsstýrismaður áseta nærri reglur um treytir fyri ávísing sambært § 24 b.

Kommunan tekur undir við, at avtalur skulu góðkennast og nærri reglur ásetast og at kommunan ynskir eina líknandi skipan sum Almannaverkið. Tó eigur hetta fyri kommununa at vera við tilvísing til landsstýrismannin í kommunumálum

Á heimasíðuni hjá Almannaverkinum verður m.a. upplýst, at persónskarin, sum kann fáa ávíst bústað er hesin:

***Heilsuligar orsøkir***
*Heilsuligar orsøkir til, at fólk ikki fáa útvega sær bústað á jøvnum føti við onnur, kann t.d. vera um ein í húskinum er úti fyri sjúku ella vanlukku, ið ger at viðkomandi má flyta í annan meira hóskandi bústað. Sum dømi, kann nevnast eldri fólk, ið av heilsuligum ávum ikki longur megna at búgva í egnum húsum. Fólk, ið fáa barn við breki, ella maki, ið hevur fingið heilaskaða, og sum ger at núverandi umstøður ikki eru nøktandi og tørvur tí er á brek- ella eldravinaligum bústaði, ella at bráðfeingis tørvur er á bústaði nærhendis sjúkrahús.*

*Eisini kann hugsast persónar, ið vegna brek, hava tørv á serligt innrættaðum bústaði og sum vegna sítt brek, ikki hava møguleika at útvega sær sín egna bústað. Talan er eitt nú um fólk við rørslutarni ella fólk, ið eru blind.*

***Sosialar orsøkir***
*Sosialar orsøkir til at fólk ikki megna at útvega sær bústað á jøvnum føti við onnur. Dømi um tað eru:*

- *Persónar, ið ikki megna at fasthalda ein bústað og eru fæstlæstir í einari sosialari støðu, ið teir ikki kunnu koma út úr vegna vantandi bústaðarmøguleikar.*
- *Persónar, ið ikki hava nógvar persónligar ressursir og sum tørva hjálp at fáa skipaði viðurskifti.*
- *Ung fólk yvir 18 ár, ið hava verið sett heiman, men nú sum ikki longur eru undir barnavernd, men skulu standa á egnum beinum.*
- *Persónar, ið hava tørv á stovnslíknandi fyriskipan í egnum heimi.*

Onki ovara aldursmark er fyri hvør kann fáa ávíst bústað gjøgnum Almannaverkið.

Kommunurnar umsita barnaverndarøkið og eldraøkið. Í mun til barnaverndarøkið hevur Tórshavnar kommuna fleiri dømi um, at sosialfakliga arbeiði við familjum, har børnini eru undir barnavernd ikki kemur á mál beinleiðis orsakað av vantandi bústaði ella ónøktandi bústaðarviðurskiftum. Hóskandi loysn fyri hesum kundi verið ávísingarrættur til leigubústað eftir nærri treytum.

Somuleiðis metir kommunan at ávísir eldri borgarar við veikari sosialstøðu detta niður ímillum, tí teir koma ikki undir treytirnar hjá Almannaverkinum og eru heldur ikki fevndir av ásetingunum í Lóg um heimatænastu og eldrarøkt v.m. í mun til upptøku á eldrabústovni.

At enda skal Tórshavnar kommuna heita á Trivnaðarnevnd Løgtingsins um at víðka ásetingina í § 13, stk 2 í Lóg um heimatænastu og eldrarøkt v.m. soleiðis, at hon umframt røktarheim, eldrasambýli, eldraíbúðir, umlættingarpláss og endurvenjingarpláss, eisini fevnir um *røktaríbúðir*.

Vinaliga

Annika Olsen
Borgartjóri

/

Eyðna Justinussen
fyrisitingarstjóri